*framhald av síðu 8*

navnfrøm nøvn sum Terji Rasmusen og Eyðun Nolsøe hava eisini meldað til luttøku í ár við hvør sínum bólki. Eisini All That Rain royna eydnuna aftur í ár.

### Gularótin mikla

– Prix Føroyar er avgjørt størsta gularótin fyri føroyskar tónleikarar, og tað skuldu verið fleiri tiltøk av hesum slag. Tað er altso ov keðiligt, at bara spæla til dans her og har av og á. Ein hevur jú brúk fyri avbjóðingum. Annars missir ein so smátt hugin at spæla tónleik í longdini, sigur Henning Nicodemussen trummusláari í All That Rain.

Henning kundi gott verið kallaður the grand old man í Prix Føroyum, tí ikki einans hevur hann fyrr verið við í kappingini sum limur í All that Rain, men hann sat eisini við trummurnar, tá ið Wolfgang bleiv nummar 3, tað árið Prix Føroyar fór av bakkastokki í 1995. Eisini var hann við í nøvnframu Kjølum, tá ið teir komu buldrandi og brakandi úr Kollafirði til Prix Føroyar.

### Góð lýsing fyri nýtt tilfar

Í ár er høvuðsendamálið við kappingini ikki at vinna, hóast tað er ongin loyna, at ágóðin av at enda á hægstu rók hevði verið fínur.

– Nei, vit eru meira við fyri at vísa okkara nýggja tilfar fram. Vit halda, at síðan vit hava fingið Rók Jakobsen og Hans Ravnsfjall í bólkin, so hava vit broytt stíl eitt sindur, og vit vóna, at fólk fara taka væl ímóti hesum nýggja tilfarinum. Tó so, vit høvdu ikki sagt nei takk, um vit enduðu við at vinna onkran vinning. Tað hevði verið ótrúliga gott t.d. at sloppið uttanlands at spælt, tí tað hava vit næstan ikki roynt áður.

Men Henning er ikki bangin fyri ikki at sleppa víðari frá fyrsta umfari.

– Altso, tað hevði ikki verið eitt flopp, um vit bert spældu í fyrsta umfari. So var málið jú nátt allíkavæl. Vit høvdu fingið okkara nýggja tilfar út til fólkið.

### Málið má verða hægri støðið

Spurdur um hann ikki heldur, at tað er eitt sindur ótrættvíst, at hann, Terji Rasmussen og Eyðun Nolsøe skulu kappast móti blaðungum tónleikarum, er Henning ósamdur.

-– Endamálið við Prix Føroyum má jú verða, at vit umboða tann besta tónleikin, ið er at finna í Føroyum. Tað nyttar jú lítið, at blaðungir ella óroyndir tónleikarar vinna Prix Føroyar, tí tað er jú ikki tann besta góðskan, ið finst her á landi. Eg haldi tvørturímóti, at fleiri royndir tónleikarar skuldu blanda seg upp í Prix Føroyar, so hevði tað føroyska tónleikastøðið óivað hækkað mundadi. Haraftura at er tað stuttligt at skula kappast móti teimum, ið ein hevur sær upp til.

All that Rain skulu spæla í tí næsta innleiðandi umfarinum í Prix Føroyum tann 12. februar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har teir millum annað skulu kappast ímóti Makrel.



*Aftur í ár verður Henning Nicodemussen við í Prix Føroyum. Hesuferð í bólkinum All That Rain, har Rókur Jakobsen, høgrumegin, er forsangari*

# Leitar enn eftir viðurkenningini



*Eyðun Nolsøe sigur, at hann bert fer at framføra nýtt tilfar, ið líkist ikki sørt tí gamla tilfarinum hjá Frændum*

**Tað munnu verða fáir føroyingar, ið ikki vita, hvør Eyðun Nolsøe er. Ikki minst kennast vit øll við navnframa Eyðun úr bólkinum Frændur, og í ár hevur Eyðun valt at luttaka á Prix Føroyum á fyrsta sinni, tó uttan Frændur men við bólkinum Showmenn**

PRIX FØROYAR
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Tað munnu verða mong við mær, ið bæði undraðust og frøddust, tá ið tey sóu navnið hjá Eyðun Nolsøe undir luttakandi tónleikabólki á heimasíðuni hjá Prix Føroyum. Tó er hetta ikki ein nýggjur tanki hjá Eyðun at luttaka á Prix Føroyum, tí hann hevur í fleiri ár gingið við Prix Føroyum í tonkunum. Serliga var tað í 1997, tá ið hann hevði givið sína fyrstu solofløgu út, at hann av álvara hugsaði um at luttaka á Prix Føroyum. Men tankin bleiv ongantíð til nakað, ikki fyrrenn nú.

– Tað hevur ongantíð ligið so væl fyri hini árini. T.d. havi eg verið uttanlands okkurt árið Prix Føroyar var, men í ár skal tað altso verða. Eg eri sera spentur, men eg veit altso ikki heilt, hvat eg kann vænta mær. Eg veit, at eg komi at kappast við nógvar góðar ungar bólkar, so eg gleði til at síggja, um mítt tilfar klára at standa mát við tilfarið hjá teimum yngru bólkunum.

### Drívmegin er viðurkenning

Spurdur, hvat annað hann hevur at náað sum tónleikari, nú hann hevur hildið á í so nógv ár, sigur Eyðun, at hann eins og so mong onnur, ongantíð fer at gevast við at leita eftir viðurkenningini.

– Tað nyttar jú lítið bara at sita heima og skriva tilfar. Øll vit menniskju vilja jú hava at vita, um tað ið vit gera er gott nokk. Tí blívi eg við at skriva og framføra mítt tilfar, eg vil jú eins og øll onnur fáa viðurkenning fyri tað sum eg geri. Eg kann t.d. vísa á, at Rolling Stones allarhelst eisini halda áfram enn, tí teir leita eisini eftir viðurkenningini. Eyðun er ikki í iva um, at tað hevði verið sera stuttligt at vunni kappingina, men tey hevði ikki verið verðsins endi, um hann ikki slapp víðari úr fyrsta umfari.

– Eg havi ikki heilt avgjørt við meg sjálvan, hvat eg skal halda um tónleik sum kapping. Tað eru jú so ólukksáliga nógv sløg av tónleiki, so tað er jú torført at samanbera t.d. mín stíl við rokk. Hóast eg ikki eri bangin fyri ikki at koma víðari úr fyrsta umfari, so hevði tað jú eisini verið stuttligt at vunnið. Men ein veit jú ongantíð, hvat tað er, ið dómararnir leita eftir. Eg haldi sjálvur, at tað finnast ótrúliga nógvir sera góðir ungir tónleikabólkar í løtuni. Og tað at ein hevur royndir, nýtist als ikki at merkja, at ein fer at vinna. Hygg t.d. eftir Hjarnum, tá ið teir vóru við. Teir gjørdust jú ikki nummar eitt ta ferðina, hóast tað var nær við.

### Prix Føroyar er

Eins og fyri so mong onnur, so Prix Føroyar tann størsta tónlistarliga gularótin, ið finst í Føroyum.

— Tað er jú ongin loyna, at tað gerst rættiliga keðiligt at bert venja og venja uttan at hava nakað at venja fram ímóti. Tískil er tað sera spennandi fyri meg, at sleppa at spæla á Prix Føroyum.

Eyðun Nolsøe fer bert at framføra nýtt tilfar, og Eyðun samanber nýggja tilfarið við tað gamla tilfarið hjá Frændur.

Eyðun Nolsøe fer at spæla í triðja og næst-seinasta umfari í Prix Føroyum tann 26.februar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.